**Røða til aliráðstevnuna**

**28. februar 2020**

Góðan dag, øll somul.

Alivinnan er ein ljóslivandi vinna í støðugari menning.

Tað vísa tølini.

Í síðstu viku kom fram, at Føroyar útfluttu laks fyri meir enn 4 mia. kr. í fjør.

Tað er tað mesta nakrantíð.

Og ongantíð fyrr hava Føroyar útflutt so nógv tons av laksi sum í fjør.

Tølini eru løtt at fyrihalda seg til, tá ið vit vilja vita, um tað gongur væl ella minni væl.

Men alivinnan í Føroyum hevur eisini eitt meira ósjónligt virði, sum ikki kann gerast upp í pengum.

***

Vit sansa tað kanska ikki sjálvi, men sjálvsálitið í Føroyum er styrkt munandi seinastu 20 árini. – Ikki bara innan aling, men á øllum økjum.

Sum samfelag tora vit betur. Vit hugsa størri. Og vit lata okkum ikki avmarka av teimum, sum siga, at einki ber til.

Tað lesa og hoyra vit dagliga.

Heimsins bestu matstovur keypa laks úr Føroyum.

Bakkafrost hevur keypt seg inn í skotsku alivinnuna.

Michelin-stjørnur eru komnar til Føroya.

Føroyskir granskarar fáa pláss í heimsins fremstu tíðarritum.

Og í summar eiga Føroyar aftur eitt ítróttafólk, sum fer at kappast millum heimsins bestu í OL.

Hetta var óhoyrt fyri 20 árum síðan.

Ambitiónirnar hjá okkara fyritøkum og einstaklingum hava flutt seg.

Orsøkirnar til góðu gongdina eru fleiri, men føroysku alifyritøkurnar hava verið við til at traðka rás.

Allastaðni í heiminum fáa tit bestu skoðsmál fyri føroyska laksin.

Føroysk alivinna er so frammalaga, at umboð fyri útlendskar fyritøkur ferðast í hópatali til Føroya, tí tey vilja vita, hvussu tit bera tykkum at.

Tað er stór virðing fyri tí, tit útinna, og Føroyar verða í sama viðfangi umtalaðar sum eitt livandi, dragandi og ríkt samfelag.

Hetta ger nakað við sjálvsfatanina hjá okkum øllum.

Eg eri sannførdur um, at tykkara góðu úrslit eru við til at flyta ambitiónirnar hjá teimum, sum virka í øðrum vinnugreinum.

Úti á okkara firðum sæst jú púra greitt, at í Føroyum ber væl til at taka initiativ, spenna seg út og hugsa stórt og øðrvísi.

Tit vísa, at í Føroyum ber væl til at bjóða av og fáa fótin fastan millum heimsins bestu.

Og júst tað hevur ein samfelagsligan týdning, sum ikki skal undirmetast.

**

Einki kemur av sær sjálvum.

Tað krevur ómetaliga nógv at vera við í fremstu røð. Kappingin um alifiskin er beinhørð.

Norra, Kili og ES spenna seg út, Ísland kýtir seg, og Russland er farið undir laksaaling á landi.

Útboðið á heimsmarknaðinum veksur støðugt, og vøksturin er tengdur at nýhugsan.

Í Føroyum skulu vit eisini hugsa nýtt.

Stig verða tikin til at ala í streymhørðum aliøkjum og á opnum havi.

Vaksandi áhugi tykist vera fyri at ala á landi. Smoltstøðir verða úbygdar og størri smolt verða ald.

Tá eg síggi myndir av nútíðar smolti, fari eg onkuntíð at ivast í, hvussu rætt tað er at kalla tað smolt.

Tað er jú hálvvaksin fiskur.

Og í hesum døgum verða tær níggju umsóknirnar um at ala tara á landi og sjógvi viðgjørdar.

Tað verður spennandi at vita, hvat fer at spyrjast burturúr hesum verkætlanunum.

**

Í landsstýrinum skulu vit eisini vera ein virkin viðspælari.

Vit arbeiða miðvíst við at vinna Føroyum minst líka góða marknaðaratgongd sum okkara kappingarneytar hava.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan ger í hesum sambandi eitt stórt arbeiði fyri vissa útlendskar keyparar um, at føroyskar matvørur eru fyrsta floks mannaføði.

Vit vilja arbeiða fyri størri fjølbroytni í alivinnuni og útvega tykkum bestu karmar at virka í.

Eg havi onga orsøk til at halda, at Føroyar ikki klára kappingina og broyttu umstøðurnar.

Vinnan hevur jú víst, at hon megnar tað.

**

Men bøtast skal um tað, sum krevur ábøtur.

Heimsframleiðslan av matvørum setur umhvørvið undir trýst.

Ein av fremstu avbjóðingunum í okkara tíð er at minka um útlát og dálking.

Í Føroyum kunnu vit erpa okkum av, at laksaalingin er lutfalsliga nógv burðardyggari enn flestu aðrar protein-framleiðslur.

Men firðirnir og aliøkini eru til láns frá okkara eftirkomarum, og tað er eisini ábyrgdin hjá alarum at taka atlit at umhvørvinum.

Tað er fortreytin fyri sunnum virksemi í longdini.

Tað er gott, at føroyska alivinnan sum heild hevur fyrilit fyri samfelagnum, hon eru partur av.

Tað øvugta skapar skjótt mistrúgv millum samfelagið og vinnuna.

Tit framleiða støðugt meira, og dálka lutfalsliga minni.
Samstundis eru tit forvitin eftir at vita, hvussu tit kunnu ala enn meira burðardygt.

Gongst sum ætlað fer biogassverkið undir framleiðslu seinni í ár.
Tá kann lívrunnið burturkast brúkast til bæði orkuframleiðslu og at góðska tø.

Tað er dømi um, at vinnan roynir áhaldandi at finna loysnir fyri at avmarka dálkingina.

Skulu Føroyar verða grønari og reinari, so er avgerandi, at vinnan er við. Og tað veit eg, at tit vilja.

Fyrst og fremst við atliti at umhvørvinum, men eisini at vaksandi eftirspurninginum eftir umhvørvisvinaligum vørum.

**

Støðan við laksalúsuni er batnað.

Færri laksalýs eru, og nýtslan av heiligvági minkar.

Í Svínoy er eisini farið undir spennandi verkætlan at ala rognkelsi, sum tekur laksalús.

Men við peikifingrinum á lofti má eg ásanna, at støðan er tíverri ikki nóg góð.

Lúsakunngerðin var – við ávísari tillagingartíð – herd 1. august í fjør.

Hon skal eftir ætlan minka smittutrýsti enn meira og eggja til at halda lúsatalinum niðri.

Eg veit væl, at tað er bæði dýrt og trupult at virka undir teimum mongu krøvunum, sum myndugleikarnir seta.

Mong tung tøk eru eisini tikin á føroysku firðunum seinastu árini.

Men stríðið lønar seg í longdini.

Í Norra eru sum heild góðar royndir við lágum lúsamarki, og eg eri sannførdur um, at føroyska alivinnan fer eisini at tillaga seg herdu treytirnar við góðum úrsliti.

Stóra avbjóðingin er nú fellið. Her eru eisini batar at hóma, men støðan er als ikki nøktandi.

**

Føroyska alivinnan eigur stóran lut í, at tað gongur so væl búskaparliga í Føroyum.

Ágóðin er sjónligur allastaðni.

Lív er fingið aftur í nakrar av virkisbygningunum, sum hava staðið tómir.

Aðrastaðni eru nýggir bygningar reistir.

Í øllum landinum verða arbeiðspláss skapt, og allastaðni spretta nýggj hugskot.

Men sum sagt, so kastar alivinnan ikki bara av sær fíggjarliga.

Sum restin av samfelagnum hevur alivinnan við góðum arbeiðshugi og hugflogi ímóti øllum forsøgnum flutt seg skjótt.

Tit hava verið framsøkin og íðin.

Tit hava víst, hvør vegurin er at fara.

Tit hvíla ikki í tí, sum er rokkið, og tit gera ikki bara meira av tí sama.

Men tað krevur eisini, at ansað verður ómetaliga væl eftir tí, sum er bygt upp.

Eg fari at nýta høvi at takka Havbúnaðarfelagnum fyri sítt íkast.

Tað er neyðugt við slíkum ráðstevnum, har vit kunnu hittast, fáa fakligt íkast og hoyra um royndir hjá øðrum.

Skráin er aftur hesaferð á tremur við fyrilestrum frá bæði Heilsufrøðiligu starvsstovuni og Fiskaaling.

Tað er hugaligt hjá mær sum landsstýrismanni at staðfesta, at í Føroyum er eitt sterkt granskingarumhvørvi innan alivinnuna.

Eg ynski tykkum øllum eina góða aliráðstevnu, og hepna hond við arbeiðinum framyvir.

Takk fyri.

Helgi Abrahamsen

Landsstýrismaður í umhvørvis- og vinnumálum